# Bára



*Súsanna og Bára*

Eg veit at Jesus elskar øll børn, og um tað hendir teimum nakað, so tekur hann tey til sín, og tey eru í hansara varðveitslu, til vit ein dag skulu síggjast aftur. Vit vita ikki, hvussu tað er í Himmalinum, men har eru øll Guds børn, og tað má vera tað besta staðið, ið vit kunnu koma til.

Góða Bára, tú fortaldi mær, at omma tín var uppi hjá Jesuspápanum, og nú eru tit eisini har, tú og Dánjal Jákup, og nógv onnur børn. Eg sakni teg, minnist aftur tær góðu løturnar, ið vit høvdu saman í barnagarðinum, her hjá okkum og heima hjá tær. Tú var so fitt, so full av kærleika, tí tú fekk so nógvan kærleika frá mammu, pápa, beiggja, ommu, abba og frá øllum teimum, sum vóru tær nær og vóru so góð við teg.

Góða Bára, tú var so góð við meg, tín kærleiki fari eg ongantíð at gloyma. Tú vil altíð vera ein partur av okkum, og minnið um teg vil fylgja okkum á lívsleiðini, tey árini ið vit fáa her á fold.

Góða Bára. Takk fyri, at tú var mín fitta vinkona, og tað vilt tú halda fram við at vera, tann fittasta vinkonan, ið nakar kann ynskja sær, í hjartanum hjá mær.

Góði Gud, ver hjá Eileen, Fróða, Teitur v. familju, Yvonnu, Arna, systkinum v/ familju, ver hjá øllum, sum hava mist sítt elskaða barn.

**Súsanna**

### *Tey bóru børn*

*Tey bóru børn til Jesus,
har knýttust kærleiksbond,
á høvur teirra legðist
vælsignandi hans hond.*

*Hann heitti á sín faðir
um hjálp at veita teim
og leiða tey til himmals,
tí har var teirra heim.*

*»Lat smábørn koma til
mín,
mítt ríki teirra er;
eg eri teirra vinur!«
Hann enn ta talu ber.*

*Eitt sinn eg við var borin
í Jesu egna favn,
tað var á dópsins degi,
eg fekk mítt kristna navn.*

*Í himmiríki binda
meg Jesu bønarbond,
og hagar Gud meg leiðir
við síni álmátts hond.*

*Úr Sunnudagsskúlasangbókini*

# Tøkk

Hjartaliga takka okur øllum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okra kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Martin Loui Eidesgaard,**
vanliga nevndur Martin hjá Mariusi av Eiði, Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum vóru um Martin, tíðina, hann lá har.
Tøkk til Jónsvein Bech, prest, kirkjutænarar, urguspælara og klokkara, ikki minst fyri, at tykur spældu valarasangin so vakurt í kirkjuni, berarar, sangarar, gravara og til tykum, ið hjálptu til og fyriskipaðu ervið.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, vitjanir, bakstur, blómur, kransar, vøkru minningarorðini og gávur til Tvøroyrar Kirkju.
Tøkk øll tykur mongu, ið fylgdu Martini til síðsta hvíldarstaðið, millum blómur við Tvøroyrarfjørð.
Skyldfólk, vinir og kenningar, hjartans tøkk øll somul.

**Ása, Martin, Hervør, Annika og Helgi**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi, langaabbi og oldurabbi

**Johannes Jacobsen**
Skómakarin
Fuglafirði

doyði og varð jarðarður.
Eina serliga tøkk til tykkum í Vesturstovu.

**Jóna, Ninnema, Óli, Oddvør, Lena, Sigga og Osvald**

# Føðingar



*9. juni fingu Vanja og Svein Petersen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4230 gr.*

28. juni fingu Kristina undir Leitinum og Hans Kári Vang, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3380 gr.

28. juni fingu Lív Arge og Peader Boylan, Aberdeen, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4200 gr.

28. juni fingu Margret Norðberg Thomsen og Búgvi Thomsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4050 gr.

29. juni fingu Tina Skaalum, Vágur og Reidar Beck, Lopra, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

30. juni fingu Helen á Lakjuni og Rúni Jacobsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3750 gr.

2. juli fingu Katrin og Gordon Rajani, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3200 gr.

2. juli fingu Annleyg Lamhauge og Hans Ellefsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3750 gr.

2. juli fingu Heidi Fagraberg og Bjarti Jøkladal, Miðvági, ein son. Hann var 46 cm langur og vigaði 2160 gr.

3. juli fingu Jenny og Høgni á Lakjuni, Fuglafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3800 gr.

3. juli fingu Malan Holm Erlingsson og Niels Gunnar Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3450 gr.

4. juli fingu Marjun Hentze og Christian Djurhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

5. juli fingu Guðrun Berg og Beinir Rasmussen, Skála, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4400 gr.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við